# Tá Havnin varð ruddað og bygd út — 1977



*Bøkjaratrøðin seinast í fimmtiárunum. Hvítu húsini ytst til høgru eru húsini hjá Hilmar og Angeliku Danielsen, sum selja Yamaha-knallertir. Niðast í myndini hómast bókahandilin hjá Hjalmar Jacobsen*

*Myndaeigari: Anna K. N. Olsen*



*Seinni er Bøkjarabrekka gjørd gjøgnum Bøkjaratrøðna. Húsini hjá Hilmari og Angeliku danilsen hava fingið ein frambygning út móti vegnum. Niðast í brekkuni sæst bókahandilin hjá Hjalmari Jacobsen. Annars er nógv broytt í Havn hesi árini…*




*Ferðslan sum vit minnast hana í Bøkjarabrekku miðskeiðis í sjeytiárunum*



*Nógv fólk leitaði sær niðan í SMS tann 2. november í 1977, tá hendan myndin varð tikin. 27. juni sama ár lat Apotekið upp í nýggjum húsum. Stórar vóru broytingarnar á Trapputrøðni hetta árið…*



*Stórar broytingar vóru miðbýnum í sjeytiárunum. Nógva bilferðslan kravdi sítt. Gomlu vegirnir máttu tillagast økta ferðslutrýstið. Handilin hjá Hjalmar Jacobsen varð fluttur inn frá vegnum.*



*Húsini hjá Lill Michelsen uppi við Tinghúsvegin vórðu tikin burtur, eins og handilshølini niðanfyri. Í dag er Bøkjarabrekka og Steinatún høvuðsæðrin millum eystara og vestara býarpartin*



*Teir eru í ferð við at taka handilin hjá Carl F niður. Har húsini stóðu, er í dag Steinatún, busssteðgistaðið í Miðbýnum. Træið vinstrumegin stendur enn á parkeringsplássinum í Steinagøtu oman fyri Føroya Banka. Aftanfyri træið hómast Frelsunarherurin*

**Um ta tíðina tá SMS varð bygt, broyttist Havnin ómetaliga nógv. Ferðslan í býnum var blivin so stór, at vegirnir langt frá kláraðu at taka ímóti øllum teimum smáu og stóru akførunum, sum troðkaðust í teimum smølu gøtunum**

BÝARMYND

*Magnus Gunnarsson*

Eftir 20 árum, frá 1950 til fyrst í 70-unum, tvífaldaðist fólkatalið í Havnini. Tann nógva ferðslan sprongdi allar verandi karmar. Hetta elvdi til stórar trupulleikar hjá íbúgvunum og kommunalu myndugleikunum, tí býurin var als ikki klárur at taka ímóti allari hesi ferðsluni og fólkavøkstrinum.

Í 1977 var Havnin eitt stórt arbeiðspláss. Tað sum órógvaði ferðsluna mest, var at alt økið í miðbýnum bleiv ruddað. Gomul hús og handlar oman fyri Føroya Banka vórðu tikin burtur, sum t.d. handilin hjá Carl hjá Vágaheina og Demmus, ið stóðu í Steinatúni.

Síðan varð Bøkjarabrekka gjørd. Hetta legði stórt trýst á ferðsluna í býnum. Øll ferðslan millum eystur- og vesturbýin gekk um Frantsabrekkuna, Káta Hornið og Áarvegin.

Hesa tíðina bleiv R. C. Effereøesgøta gjørd niðan á Háls. Hetta varð gjørt fyri at lætta um trýstið í býnum. Hesin vegur fekk stóran týdning fyri býarvøksturin, tí samstundis sum hann lætti um ferðsluna, gjørdi hann at samband fekst við tey stóru byggiøkini, har virkir og stovnar sum ikki rúmaðust niðri í gamla býnum, nú fluttu í størri virkisbygningar. Á miðstaðarøkinum á Hálsi var so smátt byrjað at seta virkisbygningar upp. Á Trapputrøðni komu SMS og Apotekið, í eysturbýnum stóð Eysturskúlin í gerð og stóra útstykkingin á Konmansmýru við 140 grundstykkjum bleiv útstykkjað. Fyri at koma til hesar útstykkingar bleiv Tjaldursvegur gjørdur millum R. C. Effersøesgøtu og Hoyvíksvegin. Hóast tað eisini bleiv útstykkjað á Ternuryggi, í Hoyvík og á Argjum, lógu umleið 200 umsóknir um grundstykkir hjá býráðnum.

1. juli 1977 var fólkatalið í Havnini 11.595. Tað vóru 3394 børn undir 16 ár. Pláss var fyri 130 børnum á vøggustovum og umleið 250 børnum í barnagørðunum. Í kommunualu dagrøktini vóru 90 børn. 2300 børn gingu í fólkaskúla, privatskúla og í framhaldsdeild. Tveir biografar vóru í býnum. Í 1976 høvdu teir sýnt 242 filmar fyri tilsamans 169315 áskoðarum. Í Havnini vóru tá 94 framleiðsluvirkir.

*Kelda: Myndablaðið Magn í 1977*



*Partar av miðbýnum blivu ruddaðir burtur í 1977. Her eru tað húsini hjá Sondum, sum verða javnaði við jørðina. Eisini sæst barberstovan hjá Andrew Nielsen og handilin hjá Sam Olsen*



*Parkeringsviðurskiftini vóru út av lagi vánalig. Umframt at vera parkeringsøki vóru tveir pylsuvognar og tvær kioskir í gamla Kommunuskúlagarðinum*

## Nakrar hendingar í 1977…



### Føroyskir plastposar

Fyrstu føroysku plastposarnir eru eins gamlir og SMS er tað. Í desember í 1977 vórðu fyrstu føroysku plastposarnir á marknaðinum. Tað var felagið Tór í Vestmanna, sum fór undir at framleiða plasposar.

Maskinurnar keypti felagið úr Danmark og Týskland ella Vesturtýsklandi, sum tað tá kallaðist, og sum neyvan nakar tá ímyndaði sær aftur skuldi broyta navn til Týskland trettan ár seinni.

Maskinurnar skuldu nýtast at framleiða ymisk sløg av plastposum, beriposar, frystiposar, ruskposar og plastsekkir.

Tað var Tórur Joensen í Vestmanna, sum sá møguleikan, sum bæði bar nýggj arbeiðspláss í Føroyum við sær, og sum minkaði um innflutningin av posum. Tá ið teir í Vestmanna fyri einari fjórðingsøld síðani fóru undir framleiðsluna av posum og sekkjum, hevði innflutningurin verið 4–5 milliónir, sum varð mett at vera sera nógv.

### Dimma fór um tey hundrað

Um tað mundið, tá SMS slerdi hurðarnar á víðan vegg hátíðarhelt Dimmalætting stóran føðingardag. 8. desember í 1977 vóru eitt hundrað ár síðani, at Dimmalætting fyrstu ferð sá daghsins ljós. Fyrsta royndarblaðið varð útgivið leygardagin 8. desember í 1877.

Í hesum fyrsta blaðnum var listi yvir partaeigararnar. Teir høvdu tilsaman teknað seg fyri 111 partabrøv, sum ljóðaðu upp á hálvt hundrað krónur hvørt.



### Jógvan gjørdist dómari

Nú er hann fyrsti løgtingsins umboðsmaður. Fyri 25 árum síðani var hann fyrsti føroyski dómarin í nýggjari tíð. Tað er Jógvan Andreassen, sum vit hugsa um, ella Joen H. Andreassen, sum hann eitur.

Fyrsta desember í 1977 varð hann settur sum dómari ella sorinskrivari. Í januar í 1958 leyk hann løgfrøðisligt embætisprógv. 1. august í 1964 kom hann til Føroya sum dómarafulltrúi, eftir at hann hevði havt sama starv í Roskilde 1960–64. Fulltrúastarvið í Føroyum hevði hann inntil hann í 1969 gjørdist rættaraassessor, og fyri fjórðingsøld síðani varð hann fyrsti føroyski dómarin.